LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 9. januar 2024
J.Nr.: LUM-16-23/11561-69
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit

um handfaringina hjá Klaksvíkar kommunu av klagum um óljóð

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um handfaringina hjá Klaksvíkar kommunu av áheitanum um óljóð, ið stava frá virkseminum, ið er á havnarøkinum í Norðhavnini í Klaksvík. Umboðsmaðurin gav í hesum sambandi Klaksvíkar kommunu eina átalu fyri handfaringina av áheitanunum grundað á, at Klaksvíkar kommuna ikki kundi skjalprógvað fyri umboðsmanninum, at klagarin hevði fingið greiða afturboðan um, hvat kommunan fór at gera í sambandi við áheitanirnar. Í hesum sambandi minti umboðsmaðurin á skylduna at svara og journalisera og heitti samstundis á kommununa um at taka hædd fyri støðuni, tá býráðslimir fáa áheitanir umvegis privatar samskiftismiðlar, ið tørva eina fyrisitingarliga viðgerð. At enda mælti umboðsmaðurin kommununi til at gera mannagongdir og reglugerð um óljóð í sambandi við leiklutin hjá kommununi sum eftirlitsmyndugleiki á umhvørvisverndarøkinum*.

## 2. Málslýsing

Í telduposti, dagfestur 22. mai 2023, hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> **“Klagað verður um handfaring av klagum um larm**
>
> Síðani 31. august 2017 og fram til dagsdato, havi eg sent óteljandi áheitanir, klagur og neyðarróp til Klaksvíkar kommunu um larm. Klagurnar eru senda vegna meg sjálva og fleiri av mínum grannum. Millum tey, sum eru rakt av larminum eru børn.
>
> Afturvendandi verða vit so plágað av larmi, at vit ikki fáa hvíld og við hvørt mugu rýma frá húsum.
>
> Vit føla ikki, at vit verða hoyrd. Vit meta ikki, at tað er gjørt, sum gerast kann fyri at tálma larminum.
>
> Vit hava verið úti fyri, at bæði kommunan og fyritøkur vísa til eina byggisamtykt, sum varð latin byggiharranum, sum bygdi húsini í ... .
>
> Kommunan setti í byggisamtyktini tað krav, at allir keyparar av húsunum skuldu kunnast um náttúrliga gangin, sum stavar frá slíkum virksemi allan sólarringin. Verkætlanin fór stutt eftir á húsagang og Eik banki tók yvir. Eik banki hevur ikki kunnað keypararnar um byggisamtyktina. Til tað kann eg leggja aftrat, at tað má vera ábyrgdin hjá kommunini, at tað er livandi, har byggiloyvi verða givin. Eingin, sum keypti hús har, hevur verið vitandi um, at gangurin fór at vera so ógvusligur. Húsini liggja bert áleið 150 metur frá havnini. Vit kenna tað niðrandi, tá vit verða mint á

> hesa byggiætlan, bæði av býráðslimum og privatu vinnuni.
>
> Larmur er skaðiligur, so hetta er ein álvarsligur trupulleiki, sum vit als ikki kunnu liva við.
>
> Trupulleikin má loysast beinaveg, tí vit orka ikki eina nátt aftrat uttan svøvn.
> ...
>
> **Viðmerking:**
>
> Kommunurnar hava ásett síni egnu markvirði (*felagskommunala reglugerðin, mín viðm.)*. Vit og Heimafriður hava áhaldandi víst á, at markvirðini eru ov høg.
>
> Viðfest eru nakrir av teimum teldupostum, sum eg síðani 2017 havi sent Klaksvíkar kommunu og býráðslimum. Umframt hava vit ringt óteljandi ferðir. Tá neyðin hevur verið størst, havi eg ringt og banka upp á privat hjá borgarstjóranum og nevndarformanninum í havnanevndini. Eisini havi eg langan tráð á Facebook, har eg regluliga, tá tað larmar, kunni býráðslimirnar um hetta. Umframt hetta víðarisendi eg eisini ein teldupost separat.
> ...”

Í klaguni vórðu viðløgd avrit av teldupostum frá klagaranum til Klaksvíkar kommunu, ið innihaldsliga fyri tað mesta vórðu stílaðir sum fráboðanir og klagur um óljóð frá skipum, ið lógu við bryggju.

Hesir teldupostar spenna yvir eitt tíðarskeið, ið er frá 2017 til 2023.

Sambært umboðsmanslógini § 6, stk. 2, skulu klagur vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at viðurskiftini áttu sær stað. Sum meginregla viðger umboðsmaðurin tí ikki mál, sum eru svarað og endaliga avgreidd fyri meira enn einum ári undan klaguni til umboðsmannin.

Av hesum ávum verða einans teir teldupostar, ið klagarin sendi Klaksvíkar kommunu í eitt ára tíðarskeiðinum undan klaguni, dagfest 22. mai 2023, viðgjørdir í hesum áliti.

Umboðsmaðurin fer heldur ikki at viðgera spurningin, ið reistur verður um byggisamtyktina fyri økið. Hendan spurning viðgjørdi umboðsmaðurin í áliti, dagfest 3. februar 2020 “Álit viðvíkjandi klagu um vantandi svar frá Klaksvíkar kommunu” (LUM 19/00106).

## 3. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Tann 26. mai 2023 varð klagan send Klaksvíkar kommunu til ummælis. Samstundis varð Klaksvíkar kommuna biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum.

Tann 29. juni 2023 sendi Klaksvíkar kommuna umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> “...
> Til tygara kunning skal viðmerkjast, at tað eru skrásett 11 mál, har A hevur sett seg í samband við Klaksvíkar kommunu í samband við óljóð.
>
> Í summum førum er talan um umbøn um innlit í ljóðmátingar, fyrispurningar um hvørji skip liggja við kai og annars fráboðan um óljóð.

Hvør fyrispurningur, áheitan og innlitsumbøn verður stovnað fyri seg í journalskipanini hjá Klaksvíkar kommunu, og verður síðani skrásett til avvarðandi stjóra; vinnu-og mentanarstjóran. Tá talan er um áheitanir um at minka um óljóðið er tað sum útgangsstøði vinnu- og mentanarstjórin, sum samskiftir beinleiðis við viðkomandi.
Málini eru ymisk í innihaldi og verða viðgjørd í mun til innihaldi. Er talan um eina ***innlitsumbøn*** verður hon eisini skrásett til løgfrøðingin, sum syrgir fyri at hon verður avgreidd rættstundis. Í samband við innlitsumbønir, er tað sum oftast Havnarmeistarin, ið savnar saman viðkomandi skjøl.

Í fleiri førum hevur viðkomandi eisini sent sama fyrispurning til býráðslimirnar. Býráðslimirnir samskifta tá beinleiðis við borgaran. Hettar verður ikki skrásett í journalskipan okkara, og umsitingin hevur ikki innlit í hetta samskifti.

Afturat hesum skal viðmerkjast A vísur til eina serstaka byggisamtykt fyri Ánirnar, til hettar skal sigast, at tað er ikki ein serstøk byggisamtykt fyri hetta økið, men tó varð ein serstøk áseting sett til byggiloyvi fyri hettar økið. Løgtingsins Umboðsmaður hevur viðgjørt hesa áseting í j.nr.: LUM-21-19/00106, og hevur Klaksvíkar kommunu tikin niðurstøðuna hjá umboðsmanninum til eftirtektar."

Saman við frágreiðingini sendi Klaksvíkar kommuna umboðsmanninum skjalayvirlit yvir skrásett mál, ið snúgva seg um ymsar áheitanir frá klagaranum til kommununa.

Tann 30. juni 2023 bað umboðsmaðurin Klaksvíkar kommunu um at geva sær eitt neyvari skjalayvirlit yvir fimm av teimum nýggjastu skrásettu málunum hjá klagaranum og avrit av svarinum, ið Klaksvíkar kommuna í hvørjum einstøkum føri hevði givið klagaranum.

Tann 30. juni 2023 varð frágreiðingin frá Klaksvíkar kommunu send klagaranum til viðmerkingar.

Tann 5. juli 2023 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar til frágreiðingina frá Klaksvíkar kommunu:

**"Ummæli og viðmerkingar til skriv frá Klaksvíkar kommunu, dagf. 29. juni í ár, í sambandi við klagu mína, dagf. 22. mai í ár.**

Tað er ikki samsvar millum talið á klagum, sum eg havi sent og tí, sum kommunan sigur seg hava skrásett. Sambært mínum yvirliti havi eg sent 65 teldupostar í sambandi við larm. Umframt havi eg ringt nógvar ferðir, bæði til kommununa og havnaskrivstovuna.

Vinnu og mentannarstjórarnir hava bert heilt fáar ferðir sett seg í samband við meg. Eg føli meg ikki hoyrda. Eingin í umsitingini hjá kommununi hevur nakrantíð verið á gátt fyri at vita, hvussu tað ljóðar inni hjá okkum. Ljóð ferðast ymiskt og okkara hús verða harðast rakt. Tað er staðfest í einari máting, sum B gjørdi inni hjá okkum og inni hjá D, dagf. 31.07.2020. Kanningin varð umbiðin av E, sum tá var varaborgarstjóri. Hon er tann einasta, sum persónliga hevur verið inni hjá okkum og kanna viðurskiftini. Tá vit høvdu sitið eina løtu og prátað, segði hon, at hetta hevði hon ikki orkað.

Um eg sum borgari havi skrivað byggisamtykt, har tað skuldi staðið byggiloyvi, mátti gjørt tað sama fyri málið um klagu mína. Hinvegin er tað, sum stendur í tí sokallaða prinsippiella byggiloyvinum, dagf. 20. mai 2006, har tað verður ásett ein treyt til byggiharran, áhugavert. Í sjálvum byggiloyvinum, dagf. 4. juli 2008, er eingin treyt ásett, sum hevur við virksemið í Norðhavnini at gera.
Umframt klagurnar frá mær, hevur Klaksvíkar kommuna móttikið fleiri klagur frá dóttir mínari og øðrum borgarum, sum búgva beint við hjá okkum.

Klagur mínar fevna eisini um onnur í grannalagnum, sum ikki hætta sær at klaga sjálvi, men hava givið mær loyvi at seta teirra nøvn undir klagurnar.

Bert heilt fáar ferðir hevur Klaksvíkar kommuna svarað mínum teldupostum.

Allir býráðslimir eru nógvar ferðir blivnir kunnaðir um støðuna, serliga gjøgnum Messenger á Facebook. Alt samskiftið við býráðslimirnar er tøkt.

Í skrivandi løtu hava vit, síðani áleið 10. mai, verði útsett fyri ekstremum, konstantum larmi frá bingjum hjá F. Kommuna og fyritøka eru vitandi um støðuna. Fyrradagin klagaði eg enn einaferð til kommununa og F um larmin, sum nú hevur vart í 50 dagar og nætur, út í eitt, uttan nakran steðg.

Eftir at hava verið útsett fyri so nógvum larmi, har tað hvørki fekst hvíld nátt ella dag, varð eg noydd at flyta úr mínum egna heimi. Onnur í grannalagnum mugu javnan av húsinum at sova fyri at fáa hvíld.

Í sambandi við ógvusliga larmin frá bingjunum hevur Umhvørivsstovan svarað mær, at eg má fáa eina avgerð frá Klaksvíkar kommunu, um tey skulu kunna gera nakað við málið. Tvær ferðir í juni mánaða havi eg biðið um avgerð, uttan at hava fingið avgerðina. Umbøn um avgerð viðv. larmi frá bingjum, móttøkuváttan 23.05.2023 er ikki svarað. Fyrispurningar mínir, aftaná 36 dagar og nætur undir torturi, eru heldur ikki svaraðir við upplýsing um nøkur avgerð er tikin, móttøkuváttan 21.06.2023. Tískil havi eg enn ikki fingið boðað Umhvørvisstovuni frá.

Handfaringin hjá Klaksvíkar kommunu av fráboðanum og klagum, vísir ikki umsorgan fyri heilsuni og trivnaðinum hjá teimum, sum búgva omanfyri Norðhavnina.

**Yvirlit yvir klagur**
Niðanfyri er eitt yvirlit yvir teldupostar frá mær til Klaksvíkar kommunu í sambandi við klagurnar um óljóð. Umframt hesar klagur, hevur Heimafriður, vegna meg, klagað fleiri ferðir, tá eg ikki havi makta ella kent tað nyttuleyst at klaga sjálv. Eisini havi eg hesi árini óteljandi ferðir ringt til Havnaskrivstovuna, oftast seint á kvøldi ella mitt á nátt. Eisini havi eg fleiri ferðir ringt til kommununa. Tíverri havi ikki skrásett, tá eg havi ringt at boða frá.

Viðfestir eru teir teldupostar, sum eg síðani 31. august í 2017 havi sent Klaksvíkar kommunu., har eingin móttøkuváttan kom. Umframt viðfesti eg tveir teldupostar. Annar er ein kunning til kommununa og annar við Cc til fleiri stovnar. Eingin hevur nakrantíð fingið hjálpt okkum.

Tá eg klagaði fyrstu ferð í 2017, sá eg ikki fyri mær, hvussu umfatandi hetta fór at verða. Eg havi tí ikki goymt teldupostarnar í serstakari mappu. Tí kann tað koma fyri, at tað er feilur í hesum yvirliti. Um Løgtingsins umboðsmaður hevur brúk fyri innliti í fleiri teldupostar, sum eg í yvirlitinum vísi til, sendi eg teir fegin.

**Móttøkuváttanir:**
...
(*Punkt 1 til 40 snúgva seg um móttøkuváttanir, ið eru sendar klagaranum í tíðarskeiðinum frá 31.08.2017 tl og við 27.04.2022, mín viðm.)*
41. Móttøkuváttan – Klaga um larm – G og H, 15.07.2022
(málsnummar: 21/01771)
42. Móttøkuváttan - Klaga um larm og ristingar, 18.07.2022 (málsnummar: 21/01771)
43. Móttøkuváttan - Bøn um hjálp, 08.08.2022 (einki málsnummar skrásett)
44. Móttøkuváttan - Umbøn um innlit - kanning og frágreiðing um landstreym í 2018,
05.09.2022 (málsnummar: 22/01528)
45. Móttøkuváttan - Klaga um I, 10.01.2023 (málsnummar: 23/00008)
46. Móttøkuváttan - Klaga um G, 06.03.2023 (málsnummar:
23/00008)
47. Móttøkuváttan - Viðv. Í, 21.03.2023 (málsnummar: 23/00008)
48. Móttøkuváttan - Klaga um J, 17.04.2023 (málsnummar: 23/00008)
49. Móttøkuváttan - Enn einaferð - Klaga um J, 19.04.2023 (málsnummar: 23/00008)
4
50. Móttøkuváttan - Áheitan viðv. G, 20.04.2023 (málsnummar:
23/00008)

51. Móttøkuváttan - Klaga um ekstreman larm - G, I, K og H, 28.04.2023 (málsnummar: 23/00008)
52. Móttøkuváttan - Klaga um larm av bingjum, 17.05.2023 (málsnummar: 23/00008)
53. Móttøkuváttan - til fund við F, 19.05.2023 (málsnummar: 23/00008)
54. Móttøkuváttan - Fáa ikki hvíld, 22.05.2023 (málsnummar: 23/00008)
55. Móttøkuváttan - Umbøn um avgerð viðv. larmi frá bingjum, 23.05.2023 (málsnummar: 23/00008)
56. Re: Umbøn um avgerð viðv. larmi frá bingjum, 27.05.2023 (ur biður um eina avgerð, men fær onga avgerð og fái tískil ikki klaga til Umhvørvismálaráðið)
57. Móttøkuváttan – Ljóðmátingar, 07.06.2023 (málsnummar: 23/00008)
58. Móttøkuváttan - Fyrispurningur aftaná 36 dagar og nætur undir torturi, 21.06.2023 (málsnummar: 23/00008)
59. Móttøkuváttan - Klaga um 50 dagar og nætur við konstantum larmi (Einki málsnummar)

**Fráboðanir uttan móttøkuváttan og málsnummar:**
...
(*Punkt 1 til 7 snúgva seg um fráboðanir og móttøkuváttanir, ið eru sendar klagaranum í tíðarskeiðinum frá 17.04.2018 til og við 23.04. 2022, mín viðm.)*
8. Klaga og umbøn um hjálp, 02.05.2022 Eingin móttøkuváttan, men vinnu- og mentanarstjórin svarar í telduposti)

**Kunning til Klaksvíkar kommunun sent Cc**
...
*( Punkt 1 og 2 eru áheitanir til Klaksvíkar kommunu um óljóð, dagfestar 30.05.2018 og 13.11.2020, mín viðm.)"*

Við soljóðandi skrivi, dagfest 5. juli 2023, vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar Klaksvíkar kommunu til ummælis:

**"Viðvíkjandi klaguni frá A, dagfest 22. mai 2023**

A hevur við telduposti tann 5. juli í ár sent umboðsmanninum viðmerkingar sínar til frágreiðing tykkara, dagfest 29. juni í ár. Hon vísir millum annað á, at tað ikki er samsvar millum talið av klagum, sum hon hevur sent, og tí sum kommunan sigur seg hava skrásett.

Hesar viðmerkingar verða sendar tykkum til ummælis.

Viðmerkjast skal at umboðsmaðurin hevur kunnað A um, at sambært umboðsmanslógini § 6, stk. 2, skulu klagur vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagið 1 ár eftir at viðurskiftini áttu sær stað. Sum meginregla viðger umboðsmaðurin tí ikki mál, sum eru svarað og endaliga avgreidd fyri meira enn einum ári undan klaguni til umboðsmannin. Um málini ikki eru avgreidd ella svarað, fer umboðsmaðurin í hesum málið tó ikki longur aftur enn 2022 fyri at avmarka málið.

Klaksvíkar kommuna verður biðin um at greiða umboðsmanninum frá, hvussu slíkar innkomnar fráboðanir verða skjalførdar, og at lata umboðsmanninum viðmerkingar til skrivið frá A innan 22. august 2023."

Tann 31. august 2023 sendi Klaksvíkar kommuna umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

**"Viðmerkingar til skrivið frá A,**
A ger vart við at tað er ikki samsvar við innkomnu kærurnar og mál, ið eru skrásett. Til hettar skal viðmerkjast at í fleiri førum eru innkomnu kærurnar latnar kommununi, um somu viðurskiftir og innan lutfalsliga stutta tíð. Í hesum førum verða fráboðanar skrásettar í einum felagsmáli hjá Vinnu- og mentanarstjóranum, sum fær fráboðan um hettar.
Eg sjálvur ella undanmaður mín hava onkuntíð svarað via telefon, men hetta er ikki noterað sum telefonnotat. Men hettar verður tikið til eftirtektar og at hettar verður gjørt frameftir.

***Mannagongd á økinum***

Klaksvíkar kommuna strembar altíð eftir at geva eina móttøkuváttan, og málið verður síðani beint til avvaraðandi stjóra. Tá talan er um kærur um larm, verður samband í flestum førum tikið við fráboðara gjøgnum telefon. A ger vart við at tað eru fleiri teldupostar, sum ikki eru skrásettir. Til hettar skal sigast at

— pkt. 37, er fráboðanin skrásett sum málsnr. 21/01771-55
— pkt. 43 er skrásett málsnr. sum 21/01771-102
— pkt. 7 klaga viðvíkjandi I er skrásett í málsnr. 21/01771, og til hettar skal viðmerkjast at A fær skrivligt svar frá táverandi vinnu- og mentanarstjóranum, sí málsnr. 21/01771-65.
  (hettar er eru teldupostar, ið eru sendir kommununi síðani 2022.
  Viðfest er skjalayvirlit viðkomandi málsnr.
— 21/00449
— 19/00046
— 21/01771
— 22/01528
— 23/00008

***Messenger***
A ger eisini vart við at allir býráðslimir eru kunnaðir um støðuna, ígjøgnum messenger á facebook. Klaksvíkar kommuna er ikki partur av hesum samskifti, og hesin bólkur, er okkum kunnugt, ein facebook bólkur, ið er stovnaður av A, har ein partur av býráðslimum luttaka. Boð frá borgarum til býráðslimir ígjøgnum Messenger, verða ikki skrásettir í journalskipan okkara.

A ger eisini galdandi at Umhvørvisstovan hevur víst aftur at viðgera eitt mál viðvíkjandi ljóðdálking, av tí at enn er ongin avgerð tikin í málinum. Til hettar skal viðmerkjast at viðvíkjandi staðsetingina av bingjunum er onki loyvi givið til tess. Bingjurnar standa á leigulendi hjá Klaksvíkar kommununu leigað av F. Tískil er ongin fyrsitingarlig avgerð tikin, sum ber við sær hoyringsskyldu og kæruvegleiðing, í samband við uppsetan av bingjunum.”

Tann 4. september 2023 vórðu viðmerkingarnar hjá Klaksvíkar kommunu sendar klagaranum til ummælis.

Tann 12. september 2023 sendir klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

“...
Eg havi ongar viðmerking til nær og um Klaksvíkar kommuna hevur svarað mær. Mín klaga snýr seg um handfaringina av mínum klagum, sum snúgva seg um ótolandi viðurskifti, sum vit í ... í Ánunum liva undir. Havast skal í huga, at Klaksvíkar kommuna hevur givið byggiloyvi til bústaðir 150 metur oman fyri havnina, nærum samstundis sum Norðhavnin varð bygd.

Klaksvíkar kommuna sigur í viðmerkingum sínum, at orsakað av, at bingjurnar standa á leigulendi hjá Klaksvíkar kommunu, leigað av F, so er eingin fyrisitingarlig avgerð tikin. Til tað er at siga, at Klaksvíkar kommuna er eftirlitsmyndugleiki hjá havnunum í kommununi.

Um Løgtingsins umboðsmaður kann gera nakað við hetta, sum munar, er bara hjá okkum at vóna. Eitt er so púra vist, at Klaksvíkar kommuna hevur lítið og einki gjørt við tey óteljandi neyðarrópini, sum ígjøgnum fleiri ár eru komin frá okkum, sum búgva í ... .
...”

Tann 23. oktober 2023 sendi umboðsmaðurin Klaksvíkar kommunu soljóðandi skriv:

**“Viðvíkjandi klagu, dagfest 22. mai 2023**

Umboðsmaðurin ynskir at fáa útvegað skjalatilfar frá Klaksvíkar kommunu, ið snýr seg um skipan av virkseminum í havnunum í Klaksvík – t.d. reglur og mannagongdir um virksemi.
...”

Tann 27. oktober 2023 svarar Klaksvíkar kommuna soleiðis:

> ”…
> Vísandi til útflyggjan av skjalatilfari ísv. reglur á havnaøkinum á Norðhavnini, hava vit ikki hetta tilfari tøkt. Havnameistarin og eg sjálvur er lutfalsliga nýggir í starvi her og er hetta ikki nakað tilfar sum vit hava. Tó arbeiða vit í løtuni við at fáa framleitt tílíkt tilfar.
> …”

Tann 30. oktober 2023 sendi umboðsmaðurin soljóðandi fyrispurning til Umhvørvisstovuna:

> ”…
> Í sambandi við eitt mál, ið umboðsmaðurin viðger, hevur umboðsmaðurin ynski um at fáa greiðu á soljóðandi fyrispurningum:

1. Kunnu tit greiða umboðsmanninum frá hvussu tit finna markvirðið fyri óljóð í tykkara umhvørvisgóðkenningum?
   a) Er talan um altjóða krøv?
   b) Í einari notu stendur: ”Ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðsstøðið í db(A) í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini” Kunnu tit greiða frá hesum?
2. Umsitur Umhvørvisstovan reglur, ið skipa virksemi í havnunum í Føroyum? Her verður hugsað um tær størru havnirnar, ið fáast við farmagoymslu, flutning og landing, og sum hevur ávíst óljóð við sær.
   a) Um so er, kunnu tit greiða frá hesum?
   b) Hevur Umhvørvisstovan nakað eftirlit við virkseminum í havnunum í Føroyum?

> …”

Tann 7. november 2023 svarar Umhvørvisstovan soleiðis uppá fyrispurningin:

> “...
> Umhvørvisstovan hevur fingið fyrispurning frá Løgtingsins umboðsmanni um óljóð frá skipum. Niðanfyri havi eg roynt at svara spurningunum.

1. Kunnu tit greiða umboðsmanninum frá hvussu tit finna markvirðið fyri óljóð í tykkara umhvørvisgóðkenningum?
   a) Er talan um altjóða krøv?
      *Eg dugi ikki at siga, um nøkur altjóða krøv eru um óljóð frá virkjum. Vit á Umhvørvisstovuni hava valt at halda okkum til donsku vegleiðingina, Vejledning fra Miljøstyrelsen, Ekstern støj fra virksomheder.* *https://www2.mst.dk/udgiv/publikationer/1984/87-503-5287-4/pdf/87-503-5287-4.pdf*
      *Vegleiðingin hevur nøkur sokallað vegleiðandi markvirði fyri óljóð frá virkjum. Sí talvu niðanfyri við vegleiðandi markvirðum frá virkjum.*
   b) Í einari notu stendur: ”Ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðsstøðið í db(A) í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini” Kunnu tit greiða frá hesum?
      *Máting og regulering av óljóði er rættiliga tekniskt, og kann tí vera trupult at skilja. Í kassanum niðanfyri er eitt brot av s. 11 í donsku vegleiðingini um óljóð. Vónandi er tað svar upp á henda spurningin (tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðsstøði í dB(A).*

      *Markvirðini fyri óljóð frá virkjum eru galdandi uttandura, tvs. at ljóðið verður mátað uttandura. Markvirði fyri óljóð eru ymisk í eitt nú bústaðarøkjum og vinnuøkjum. Í vinnuøkjum er markvirðið hægri enn í bústaðarøkjum. Markvirðið fyri óljóð hjá einum virki skal skiljast soleiðis, at ískoytið til óljóðsstøðið frá hvørjum einstøkum virki í t.d. einum bústaðarøkið, skal vera undir markvirðið.*

2. Umsitur Umhvørvisstovan reglur, ið skipa virksemi í havnunum í Føroyum? Her verður hugsað um tær størru havnirnar, ið fáast við farmagoymslu, flutning og landing, og sum hevur ávíst óljóð við sær.

   *Kommunurnar eru tann lokali umhvørvismyndugleikin, og eru tað tí kommunurnar, sum eru myndugleiki, tá tað snýr seg um óljóð frá skipum í havn. Tær størru kommunurnar hava í felag gjørt eina sonevnda felagskommunala reglugerð um óljóð frá skipum. Í felagskommunalu reglugerðini eru markvirði fyri, hvussu nógv skipini kunnu larma, meðan tey liggja í havn. Í stuttum kann sigast, at øll skip, sum koma í føroyska havn, skulu lúka treytirnar um óljóð í reglugerðini. Gera tey ikki tað, fáa tey eina freist at fáa viðurskiftini í rættlag. Lúka tey ikki krøvini, tá freistin er farin, sleppa tey ikki í havn. Hesi markvirði kunnu ikki tó samanberast við markvirðini, sum verða brúkt til óljóð frá virkjum.*

   a) Um so er, kunnu tit greiða frá hesum?

      *Umhvørvisstovan umsitur ikki felagskommunalu reglugerðina um óljóð frá skipum.*

   b) Hevur Umhvørvisstovan nakað eftirlit við virkseminum í havnunum í Føroyum?

      *Umhvørvisstovan skal ansa eftir, at kommunurnar røkja sína eftirlitsskyldu sambært § 8 í kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur. Sambært § 31, stk. 3 kann Umhvørvisstovan ”um kommunustýri ella kommunufelagsskapur ikki røkir tær eftirlitsuppgávur, sum eru álagdar kommunustýrinum eftir hesi kunngerð, geva kommunustýrinum boð um, hvussu viðurskiftini skulu fáast í rættlag”.*

...”

Tann 8. november 2023 sendi umboðsmaðurin soljóðandi uppfylgjandi spurning til Umhvørvisstovuna:

“...
Í svari tínum til niðanfyristandandi spurning frá umboðsmanninum, sigur tú m.a. soleiðis:

1. Umsitur Umhvørvisstovan reglur, ið skipa virksemi í havnunum í Føroyum? Her verður hugsað um tær størru havnirnar, ið fáast við farmagoymslu, flutning og landing, og sum hevur ávíst óljóð við sær.

*“Kommunurnar eru tann lokali umhvørvismyndugleikin, og eru tað tí kommunurnar, sum eru myndugleiki, tá tað snýr seg um óljóð frá skipum í havn...”*

Umsitur Umhvørvisstovan nakrar reglur viðv. óljóði frá havnaøkjum, ið ikki stavar frá skipum? t.d. óljóð frá farmagoymslum, frystibingjum, ferðslu v.m?

Um ikki, er tað so ábyrgdin hjá einstøku kommununum at gera reglur viðvíkjandi óljóði frá havnaøkjum, ið ikki stavar frá skipum?

Tann 14. november 2023 sendi Umhvørvisstovan soljóðandi svar til umboðsmannin:

“...
Sum eg nevndi, er kommunan tann lokali umhvørvismyndugleikin. Umhvørvisstovan er myndugleiki í sambandi við sonevnd serliga dálkandi virkir, eisini nevnd kap. 5 virkir, sum skulu hava umhvørvisgóðkenning. Hesi eru nevnd í fylgiskjalinum til umhvørvisverndarlógina. Sí https://www.logir.fo/Logtingslog/134-fra-29-10-1988-um-umhvorvisvernd-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-128-fra-22
Tað eru eitt nú brennistøðir, elverk, størri fiskavirkir, aling av fiski.
Umhvørvisstovan hevur eftirlit við kap. 5 virkjum á havnarløgum, meðan kommunan hevur eftirlit við øðrum virkjum, eitt nú farma- og frystigoymslum, landing, heilsølum o.ø.
...”

Tann 23. november 2023 sendi umboðsmaðurin soljóðandi fyrispurning til Umhvørvismálaráðið:

> “**Fyrispurningur frá Løgtingsins umboðsmanni**
> Í sambandi við viðgerðina hjá umboðsmanninum av einari klagu um óljóð frá bingjum á einum havnaøki, hevur umboðsmaðurin tørv á, at Umhvørvismálaráðið gevur eina frágreiðing til umboðsmannin um kommunalu eftirlitsuppgávuna á umhvørvisverndarøkinum viðvíkjandi óljóði.
>
> Talan er um frágreiðing um viðurskifti, ið, sum umboðsmaðurin skilir reglurnar, ikki eru fevnd av felagskommunalu havnareglugerðini, ið snýr seg um óljóð frá skipum og skipavirksemi.
>
> Í sambandi við klagumálsviðgerðina hevur Umhvørvisstovan úttalað seg um, at Umhvørvisstovan sambært kap. 5 í umhvørvisverndarlógini (løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd) hevur eftirlit við sonevndum serliga dálkandi virkjum, meðan tann kommunali myndugleikin hevur eftirlit við øðrum virkjum, eitt nú farma- og frystigoymslum, landing, heilsølum o.ø.
>
> § 8 í kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur sigur soleiðis frá teimum umhvørvisverndartiltøkum, ið ein kommuna kann seta í verk í mun til vinnuligt virksemi:
>
> > “**§ 8**. Elvir vinnuligt virksemi, herundir vinnuligt, alment virksemi og alment og privat byggivirksemi, sum ikki er umfatað av kap. 5 í løgtingslóg um umhvørvisvernd, til dálking ella til heilsuvanda, kann bý- ella bygda(r)ráðið geva boð um, at neyðug tiltøk skulu setast í verk til at fyribyrgja hesum, herundir at avmarkingar skulu vera í tíðarskeiðnum, sum virksemið kann fara fram í.”
>
> § 9 í umhvørvisverndarlógini sigur soleiðis um kunngerðarheimild hjá landsstýrismanninum at seta krøv um markvirði fyri óljóði v.m.:
>
> > “**§ 9**. 1) Landsstýrismaðurin kann gera ásetingar um krøv um dygd á yvirflatuvatni, luft, jørð, strondum og vøtnum eins og um markvirði fyri óljóði, ristingum og geislingum.”
>
> Harafturat ásetur § 1, stk.1, nr. 2 í umhvørvisverndarlógini, at ætlanin við lógini er at fyribyrgja og minka um larmvansar.
>
> Vísandi til omanfyrinevnda, fari eg at biðja Umhvørvismálaráðið um at greiða mær frá:
>
> 1. Hvussu kommunala eftirlitið á umhvørvisvendarøkinum verður útint í praksis? Undir hesum greiða frá, um talan er um aktivt eftirlit og um eftirlitið eisini fevnir um vansar av óljóði.
> 2. Um ráðið metir, at ein kommuna hevur neyðuga heimild at gera eina bindandi reglugerð – t.d. um markvirði - í sambandi við virksemi, ið hevur óljóð við sær, eitt nú óljóð frá frystibingjum, flutningi og virksemi á einum havnarlagi.
>
> Harafturat vísir Umhvørvisstovan á, at Umhvørvisstovan sambært § 31 í kunngerðini skal ansa eftir, at kommunurnar røkja sína eftirlitsskyldu sambært § 8 í somu kunngerð.
>
> Eg fari tí eisini at biðja Umhvørvismálaráðið um at greiða mær frá:
>
> 3. Hvussu eftirlitið hjá Umhvørvisstovuni sambært § 31 í kunngerðini verður útint í praksis? Undir hesum um talan er um aktivt eftirlit og um eftirlitið sambært § 31 fevnir um eftirlitsuppgávur hjá kommununi í sambandi við vansar av óljóði?
>
> ...”

Tann 27. november 2023 bað umboðsmaðurin um at fáa avrit av leigusáttmálanum fyri viðkomandi fyritøku, ið virkar á havnarøkinum í Norðhavnini.

Tann 4. desember 2023 sendi Klaksvíkar kommuna umboðsmanninum avrit av umbidna leigusáttmálanum. Hóast leigusáttmálin hevur ávísar ásetingar um umhvørvisvernd, hevur hann ongar ásetingar, ið snúgva seg um óljóð.

Tann 9. desember 2023 sendi Umhvørvismálaráðið soljóðandi frágreiðing:

> **"Viðvíkjandi fyrispurningi um umhvørviseftirlit**
> ...
>
> Umboðsmaðurin biður Umhvørvismálaráðið greiða sær frá trimum viðurskiftum:
>
> 1. *Hvussu kommunala eftirlitið á umhvørvisvendarøkinum verður útint í praksis? Undir hesum greiða frá, um talan er um aktivt eftirlit og um eftirlitið eisini fevnir um vansar av óljóði.*
> 2. *Um ráðið metir, at ein kommuna hevur neyðuga heimild at gera eina bindandi reglugerð – t.d. um markvirði – í sambandi við virksemi, ið hevur óljóð við sær, eitt nú óljóð frá frystibingjum, flutningi og virksemi á einum havnarlagi.*
> 3. *Hvussu eftirlitið hjá Umhvørvisstovuni sambært § 31 í kunngerðini verður útint í praksis? Undir hesum um talan er um aktivt eftirlit og um eftirlitið sambært § 31 fevnir um eftirlitsuppgávur hjá kommununi í sambandi við vansar av óljóði*
>
> **Umhvørvismálaráðið skal viðmerkja:**
> Umhvørvismálaráðið skal fyrst gera vart við, at svarið kann vera merkt av tí heldur stutta skotbránum. Spurningarnir hjá umboðsmanninum eru ógvuliga opnir og víðfevndir, og tí er umboðsmaðurin vælkomin at venda aftur til Umhvørvismálaráðið, um tørvur er á at fáa ávís viðurskifti nágreinað.
>
> *Almennu ásetingarnar í §§ 1-3*
> Hóast umhvørvisverndarlógin fevnir um óljóðsdálking, seta tær almennu ásetingarnar í §§ 1-3 í sær sjálvum einki forboð fyri óljóði. Umhvørvisverndarlógin er ein heimildarlóg, sum útvegar landsstýrisfólkinum heimildir at áseta reglur til at basa dálking, og §§ 1-3 hava týdning sum yvirskipaður karmur, eitt nú tá ið reglur verða ásettar sambært lógini ella vegleiðingar verða gjørdar.
>
> *Eftirlit sambært umhvørvisverndarlógini*
> Sambært § 36 í umhvørvisverndarlógini snýr eftirlit sambært lógini seg um at hava eftirlit við,
>
> 1) at *lógin* og tær *reglur*, ið ásettar eru við heimild í lógini, verða hildnar,
> 2) at *avgerðir* um *boð* ella *forboð* verða lýddar, og
> 3) at *treytir* ásettar í sambandi við góðkenningar og loyvi verða hildnar.
>
> Umhvørvisverndarlógin nágreinar ikki, hvussu eftirlitið skal leggjast til rættis, ella hvussu víðfevnt tað skal vera. Tær ógvuliga fáorðaðu viðmerkingarnar til lógaruppskotið greiða heldur ikki nærri frá eftirlitsskylduni. Tó er greitt, at skal talan vera um munadygt eftirlit, má eftirlitið í ávísan mun vera virkið. Yvirskipað ber eisini til at siga, at eftirlitið eigur at verða lagt soleiðis til rættis, at tað er í samsvari við skynsama fyrisiting av umhvørvisverndarlógini.
>
> Eftirlitsuppgávan á umhvørvisøkinum snýr seg tó ikki bara um eftirlit við reglum, boðum, forboðum og treytum sambært § 36, men eisini í stóran mun um at vegleiða fyritøkur og onnur. Eftirlitsmyndugleikin kann eitt nú luta viðkomandi vitan við fyritøkur og onnur, sum hesi so kunnu brúka til at tillaga framleiðslu, mannagongdir og annað, so at galdandi løggáva og reglur verða hildnar. Umhvørviseftirlitið kann eisini gera sítt til at varpa ljós á umhvørvisávirkan av ávísum virksemi og vísa á, hvussu sleppast kann undan óhappum og óneyðugari dálking. Umhvørviseftirlitið hevur samanumtikið ein týðandi leiklut at fáa løggávu og reglur at rigga í verki og at sleppa undan óneyðugari dálking.
>
> Ein týðandi partur av umhvørviseftirlitinum er samskifti við fyritøkur um at finna loysnir á serligum avbjóðingum. Slíka loysnir kunnu bæði gagna umhvørvinum, borgarum í nærsamfelagnum og fyritøkunum sjálvum. Klagur um ampa av óljóði ella lukti kunnu vera ógvuliga truplar at handfara,

men við samskifti við tey, sum varða av virkseminum, ber ofta til at finna loysnir, sum loysa avbjóðingarnar á nøktandi hátt, uttan at neyðugt verður at geva boð.

*Eftirlits- og umsitingaruppgávur*
Sambært § 35, stk. 2, í umhvørvisverndarlógini kann landsstýrisfólkið við kunngerð lata øðrumegin kommunum ella kommunufelagsskapum og hinumegin landsstovnum sínar eftirlits- og umsitingaruppgávur sambært umhvørvisverndarlógini at sita fyri:

> *2. stk.* Landsstýrismanninum verður heimilað við kunngerð at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur tess eftir hesi lóg út til kommunu ella kommunufelagsskapir. Um hvørki kommunan einsæris ella kommunalur felagsskapur eru førir fyri at átaka sær at umsita lógina á staðnum, kann landsstýrismaðurin leggja eftirlits- og umsitingaruppgávurnar til ávísan landsstovn ella landsstovnar.

Sum § 35, stk. 2, er orðað, er tað bara, tá ið kommunur ella kommunufelagsskapir ikki eru før fyri at umsita lógina á staðnum, at landsstýrisfólkið kann leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur til ávísan landsstovn ella landsstovnar, sbr. § 35, stk. 2, 2. pkt. Løgtingið hevur við hesum givið til kennar, at umsitingaruppgávur eftir lógini í mestan mun skulu latast kommununum sum staðbundnum myndugleikum at sita fyri. Hetta kann í ávísan mun tykjast sum ein andsøgn, við tað at umhvørvisfyrisiting kann vera ógvuliga krevjandi bæði fyrisitingarliga og umhvørvisfakliga og kommunur ofta hava ymiskan og avmarkaðan førleika á hesum økjum.

Við heimild í § 35, stk. 2, í umhvørvisverndarlógini hevur landsstýrismaðurin býtt eftirlits- og umsitingaruppgávur sambært lógini millum kommunurnar og Umhvørvisstovuna. Kommunurnar varða serliga av viðurskiftum, sum viðvíkja borgaranum, men eisini vinnuligum virksemi, sum ikki er flokkað sum *serliga dálkandi* sambært fylgiskjalinum til umhvørvisverndarlógina, sbr. § 26, stk. 1. Umhvørvisstovan varðar av serliga dálkandi virksemi sambært 5. kapitli í umhvørvisverndarlógini, men hevur eisini eftirlit við ymsum kommunalum viðurskiftum, m.a. spillvatnsviðurskiftum hjá kommunalum stovnum.

***1. Hvussu kommunala eftirlitið á umhvørvisverndarøkinum verður útint í praksis? Undir hesum greiða frá, um talan er um aktivt eftirlit og um eftirlitið eisini fevnir um vansar av óljóði.***
Umboðsmaðurin sigur seg fyrst í skrivinum vilja hava eina frágreiðing um *kommunalu eftirlitsuppgávuna á umhvørvisøkinum viðvíkjandi óljóði*. Umhvørvismálaráðið skilur tí henda fyrsta spurningin soleiðis, at sipað verður til heimildirnar hjá kommunustýrum sambært § 8 í kunngerðini um umhvørvisreglur at geva boð viðvíkjandi óljóði.

Landsstýrisfólkið hevur við § 8, stk. 1, í kunngerðini um umhvørvisreglur givið kommunustýrinum heimild at geva *vinnuligum virksemi*, sum elvir til *dálking* ella *heilsuvanda*, men sum *ikki* er nevnt í fylgiskjalinum til umhvørvisverndarlógina og tí *ikki* er flokkað sum *serliga dálkandi*, boð um at seta *neyðug* tiltøk í verk.

Ásetingin er orðað sum rættarligur standardur, sbr. orðini *dálking* og *heilsuvanda*, og kommunustýrið hevur í útgangsstøðinum stórt rásarúm at meta um, nær og hvussu heimildin verður brúkt, eitt nú við atliti at óljóði.

Tó eru nøkur viðurskifti, sum havast mugu í huga við atliti at heimildini í § 8, stk. 1, í kunngerðini um umhvørvisreglur.

*Varandi ella áhaldandi virksemi knýtt at ávísari fastogn*
Reglurnar í 5. kapitli í umhvørvisverndarlógini um dálking frá vinnuligum virksemi fevna í útgangsstøðinum bara um virksemi, sum er knýtt at ávísari fastogn. Henda grundleggjandi treytin, sum skilst á viðmerkingunum til donsku miljøbeskyttelsesloven frá 1973[1], haðan 5. kapittul í føroysku umhvørvisverndarlógini upprunaliga stavar, og sum verður endurtikin í viðmerkingum til nýggjari danskar umhvørvisverndarlógir[2], ber sambært fyrisitingarvenju og løgfrøðiligum

1 Forslag til Lov om miljøbeskyttelse, Folketingstidende, Folketingsåret 1972-73, Tillæg A. (241), s. 3935
2 Miljøbeskyttelsesloven (2. udgave) – Med kommentarer af Gorm Møller, Jurist- og Økonomiforbundets Forlag, 2019, s. 151

bókmentum í sær eitt krav um, at virksemið skal vera av *varandi* ella *áhaldandi* slag[3]. Virksemi, sum, hóast tað verður útint á ávísari fastogn, bara verður útint í avmarkað tíðarskeið, er tí *ikki* fevnt av virksemishugtakinum í 5. kapitli í umhvørvisverndarlógini og kemur eitt nú ikki undir góðkenningarskyldu, um talan er um serliga dálkandi virksemi. Júst nær ið virksemi kann sigast at vera varandi ella áhaldandi, veldst um eina ítøkiliga meting.

§ 8 í kunngerðini um umhvørvisreglur frá 1994 stavar í høvuðsheitum úr soljóðandi § 41 í 5. kapitli í donsku miljøbeskyttelsesloven frá 1991 (lov nr. 358 af 6. juni 1991):

> **§ 41.** Hvis erhvervsvirksomheder, herunder private eller offentlig bygge- og anlægsarbejder, eller faste anlæg til energiproduktion, som ikke er omfattet af regler fastsat i medfør af § 33, stk. 1,[4] medfører uhygiejniske forhold eller væsentlig forurening, herunder affaldsfrembringelse, kan kommunebestyrelsen give påbud om at forureningen skal nedbringes.
> *Stk. 2.* Tilsvarende påbud kan gives af kommunalbestyrelsen, når nævnte virksomheder eller anlæg medfører væsentlig mere forurening, herunder affaldsfrembringelse, end nødvendigt ved anvendelsen af den til enhver tid værende, mindst forurenende teknologi eller bedst mulige rensning. Påbud kan endvidere gives over for aktiviteter, som skønnes at indebære en nærliggende risiko for væsentlig forurening eller uhygiejniske forhold.
> *Stk. 3.* Kommunalbestyrelsen kan give påbud om, at der skal foretages afhjælpende foranstaltninger overfor idrætsanlæg, fritidsklubber eller lignende fritidsaktiviteter, som medfører væsentlige stjøjulemper for omgivelserne.
> *Stk. 4.* Kan ulemperne ikke afhjælpes, kan kommunalbestyrelsen nedlægge forbud imod virksomheden eller aktiviteten.
> *Stk. 5.* Bliver tilsynsmyndigheden i forbindelse med etablering, udvidelse eller ændring af en af de i stk. 1 virksomheder opmærksom på forhold, som kan forventes at medføre krav om begrænsning af virksomhedens forurening eller forbud mod virksomhedens drift, kan tilsynsmyndigheden på forhånd tilkendegive dette over for virksomheden.

Danska ásetingin hevði í høvuðsheitum uppruna í soljóðandi kap. 11 í bekendtgørelse nr. 664 af 16. december 1982 af reglement om miljøbeskyttelse:

> **11.1.** Medfører erhvervsvirksomheder, som ikke er optaget på bilaget til lov om miljøbeskyttelse, i en ikke uvæsentlig grad uhygiejniske forhold eller ulemper for omgivelserne, kan kommunalbestyrelsen meddele påbud om foretagelse af afhjælpende foranstaltninger inden en bestemt frist, herunder eventuelt om begrænsning af det tidsrum, hvori virksomheden må være i drift. Ved erhvervsvirksomhed forstås tillige virksomheder, anlæg eller indretninger, som helt eller delvis ejes eller drives af offentlige myndigheder, samt private eller offentlige bygge- og anlægsarbejder.
> **11.2.** Tilsvarende gælder for idrætsanlæg, fritidsklubber og lignende fritidsaktiviteter, som medfører væsentlige støjulemper for omgivelserne.
> **11.3.** Kan ulemperne ikke afhjælpes, eller overtrædes påbud i medfør af 11.1 og 11.2., kan kommunalbestyrelsen nedlægge forbud imod virksomheden eller aktiviteten.

Inntrivsmøguleikarnir í donsku ásetingini, sum var fyrimynd fyri § 8 í kunngerðini um umhvørvisreglur, vóru sambært teimum serligu viðmerkingunum til § 41 í donsku miljøbeskyttelsesloven frá 1991[5] ásettir *í samsvari við* ásetingarnar í § 40, stk. 1-3, í sama lógaruppskoti. § 40, stk. 1-3, í donsku miljøbeskyttelsesloven frá 1991 svaraði í høvuðsheitum til § 34, stk. 1-3, í 5. kapitli í føroysku umhvørvisverndarlógini.
Ásetingin í § 41 í donsku umhvørvisverndarlógini frá 1991 er í høvuðsheitum varðveitt í § 42 í galdandi donsku miljøbeskyttelseslov[6], sbr. stk. 1 og 3-4.

Av tí at § 8 í kunngerðini um umhvørvisreglur soleiðis hongur saman við 5. kapitli í umhvørvisverndarlógini – í donsku miljøbeskyttelsesloven er samsvarandi áseting ásett í sjálvum 5. kapitli – metir Umhvørvismálaráðið, at ásetingin skal skiljast í samanhangi við virksemishugtakið í 5. kapitli í umhvørvisverndarlógini. Tað ber í sær, at § 8 í kunngerðini um umhvørvisreglur bara fevnir um virksemi, sum er knýtt at ávísari fastogn og er av varandi ella áhaldandi slag.

3 Miljøbeskyttelseloven med kommentarer ved Jørgen Bjerring og Gorm Møller, Jurist- og Økonomforbundets Forlag, 1986, s. 261
4 Svarar í høvuðsheitum til § 33 umhvørvisverndarlógini.
5 FT 1990-91 (2. saml.), tillæg A, sp. 1550 f.
6 https://www.retsinformation.dk/eli/lta/2022/100

Danskar løgfrøðibókmentir[7] staðfesta hetta sama, at *somu* treytir galda fyri inntriv sambært ávikavist § 42 og § 41 í donsku miljøbeskyttelsesloven, tá ið sæð verður burtur frá rættarverndartíðarskeiðnum í § 41. §§ 42 og 41 í donsku miljøbeskyttelsesloven svara í høvuðsheitum til ávikavist § 8 í kunngerðini um umhvørvisreglur og § 34 í umhvørvisverndarlógini. Tann avgerandi munurin millum ásetingarnar er, at § 34 í umhvørvisverndarlógini fevnir um serliga dálkandi virksemi, sum *er* nevnt í fylgiskjalinum til lógina, og § 8 í kunngerðini um umhvørvisreglur fevnir um vinnuligt virksemi, sum *ikki* er nevnt í fylgiskjalinum til lógina. Og har ið serliga dálkandi virksemi krevur umhvørvisgóðkenning, *áðrenn* farið verður undir ávíst virksemi, sbr. § 26 í umhvørvisverndarlógini, snúgva heimildirnar í § 8 í um kunngerðini um umhvørvisreglur seg um virksemi, sum *er* í gongd.

Umhvørvismálaráðið er ikki kunnigt við, at kommunustýrir hava givið vinnuligum virksemi boð sambært § 8, stk. 1, í kunngerðini um umhvørvisreglur til at basa óljóði, men skal vísandi til tað omanfyri nevnda vísa á, at talan skal vera um virksemi av *varandi* ella *áhaldandi* slag á ávísari *fastogn*.

*Einstaklingaviðurskifti*
Alt síðan ta fyrstu donsku miljøbeskyttelsesloven frá 1973 hevur verið greitt, at ikki ber til at leggja upp fyri serligum viðkvæmi hjá einstaklingum, tá ið sitið verður fyri lógini[8]. Tá ið mett verður um ampa, sum virksemi veldur umhvørvinum uttanum, skal støði tí takast í *vanligum* viðkvæmi hjá fólki.

*Fyrilit*
Sum nevnt, hevur kommunustýrið sum myndugleiki sambært § 8 í kunngerðini um umhvørvisreglur í útgangsstøðinum stórt rásarúm at meta um, nær og hvussu heimildirnar verða brúktar. Eftirlitsmyndugleikin er tó ikki frítt stillaður, tí tað skilst m.a. á teimum almennu ásetingunum í §§ 1-3 í umhvørvisverndarlógini, hvørji fyrilit ið eru viðkomandi, og hvørji ið hava serligan týdning. Tað er eitt eyðkenni við umhvørvislóggávu, at endamálsásetingar hava stóran týdning, við tað at tær seta karmin um lóglig fyrilit og eru útfyllandi, tá ið fyrilit verða vigað.

Verður endamálið við umhvørvisverndarlógini, sbr. § 1, havt í huga, er greitt, at eftirlitsmyndugleikin fyrst og fremst skal síggja til, at til ber at avmarka dálking í *nøktandi* mun. Lógin vísir ikki neyvt á, hvat ið skal vera at rokna sum góðtakilig dálking, men § 34, sum § 8 í kunngerðini um umhvørvisreglur í stóran mun endurspeglar[9], gevur eina ábending um, at treytin um, at dálkingin ikki skal vera *uttan týdning*, hevur týdning, tá ið sitið verður fyri umhvørvisverndarlógini.

Boð sambært § 8 í kunngerðini um umhvørvisreglur verða eisini at lúka vanlig fyrisitingarættarlig krøv, m.a. krøv um, at avgerð skal takast á upplýstum grundarlag, og at leggjast skal upp fyri m.a. líkaregluni og meginreglum um sakliga fyrisiting og proportionalitet.

Leggjast skal eisini upp fyri soljóðandi § 64 í umhvørvisverndarlógini:

> **§ 64.** Áðrenn avgerð verður tikin um boð ella forboð, skal móttakarin hava skrivliga frásøgn og kunnast við, at hann hevur rættindi til málsinnlit og til at bera síni sjónarmið fram. Móttakarin eigur í hesum sambandi at fáa áheitan um at veita upplýsingar, ið kunnu lýsa kostnað, fyrimunir og vansar við avgerðini.
> *2. stk.* Frásøgn sum nevnd í 1. stk. kann verða frávikin, um stundislig avgerð er kravd, ella um frásøgn eyðsýnd kann ætlast at vera óneyðug.

*Markvirðir*
Við markvirðum ber til at nágreina innihaldið í omanfyri nevndu treyt um, at talan skal vera um dálking, sum ikki er *uttan týdning*. Umframt at landsstýrisfólkið kann áseta bindandi markvirðir sambært § 9 í umhvørvisverndarlógini, kann eftirlitsmyndugleikin áseta vegleiðandi markvirðir.

7 Miljøbeskyttelsesloven (2. udgave) – Med kommentarer af Gorm Møller, Jurist- og Økonomforbundets Forlag, 2019, s. 836
8 Miljøbeskyttelsesloven (2. udgave) – Med kommentarer af Gorm Møller, Jurist- og Økonomforbundets Forlag, 2019, s. 162
9 FT 1990-91 (2. saml.), tillæg A, sp. 1550 f.

Á viðmerkingunum til § 41 í donsku miljøbeskyttelsesloven frá 1991, sum í høvuðsheitum svaraði til § 8 í kunngerðini um umhvørvisreglur, skilst, at ásetingin varð ætlað at verða brúkt saman við vegleiðingum:

> Miljøstyrelsen har udarbejdet en række vejledninger om vurdering af forureningsforhold for at sikre, at der ved miljøsagsbehandling foretages en rimelig ensartet vurdering (f.eks. om luft, støj og spildevand).
>
> Styrelsen vil så vidt muligt udarbejde branchevejledninger for virksomhedstyper, der er karakteriseret ved, at der er mange af slagsen, og at de har meget ensartede forureningsforhold (såsom trævirksomhed og korn- og foderstofvirksomheder).

Har ið bindandi markvirðir við heimild í § 9 í umhvørvisverndarlógini høvdu verið stílað tí dálkandi fyritøkuni, eru vegleiðandi markvirðir serliga stílað eftirlitsmyndugleikanum.

Tað er eitt vanligt eyðkenni við umhvørvisfyrisiting, at vegleiðingar hava ein stóran leiklut í sambandi við metingarmerktar avgerðir við støði í breiðum meginreglum. Ein myndugleiki kann uttan serliga heimild gera vegleiðingar um, hvussu metingarheimildir í lóggávu, sum myndugleikin situr fyri, skulu tulkast og útinnast.

Hóast vegleiðandi markvirðir ikki eru beinleiðis bindandi, kunnu tey, um støði verður tikið í teimum í sambandi við ítøkilig eftirlitsmál, gjøgnum fyrisitingarvenju óbeinleiðis gerast bindandi, so at frávik frá teimum krevja ítøkiliga grundgeving og møguliga kunnu átalast eftir valdreingjanarlæruni ella líkskaparregluni, um tey ikki byggja á sakliga grundgeving og lúka kravið um sakliga fyrisiting.

Tá ið markvirðir verða ásett, annaðhvørt við heimild í § 9 ella í vegleiðing, eigur serliga at verða lagt upp fyri § 3, stk. 3, í umhvørvisverndarlógini:

> *3. stk.* Tann, ið útinnir ella ætlar at byrja virki sum umrøtt í § 2, skal fremja tær til fyribyrgingar og forðingar av dálkingini neyðugu atgerðir og leggja til rættis rakstur virkisins á ein slíkan hátt, at virkið í minst møguligan mun elvir dálking.

Bindandi markvirðir fyri óljóð frá vinnuligum virksemi, sum ikki er flokkað sum serliga dálkandi sambært fylgiskjalinum til umhvørvisverndarlógina, eru ongantíð ásett sambært § 9 í umhvørvisverndarlógini.

Umhvørvisstovan hevur í eini vegleiðing frá 2011[10] ásett vegleiðandi markvirðir fyri óljóði frá vinnuligum virksemi, sum ikki er serliga dálkandi sambært 5. kapitli í umhvørvisverndarlógini, men Umhvørvismálaráðið hevur ikki kunnleika um, at kommunustýrir brúka vegleiðingina í sambandi við boð sambært § 8, stk. 1, í kunngerðini um umhvørvisreglur.

Umhvørvisstovan sigur seg ikki hava kunnleika til mannagongdir hjá kommununum við atliti at ampum av óljóði. Umhvørvisstovan sigur seg tó hava ta fatan, at eftirlitið hjá kommunum í størstan mun er *reaktivt* – eitt nú í sambandi við klagur frá borgarum.

***2. Um ráðið metir, at ein kommuna hevur neyðuga heimild at gera eina bindandi reglugerð – t.d. um markvirði – í sambandi við virksemi, ið hevur óljóð við sær, eitt nú óljóð frá frystibingjum, flutningi og virksemi á einum havnarlagi.***

Ein kommuna hevur onga heimild sambært umhvørvisverndarlógini at áseta bindandi markvirðir fyri virksemi, sum elvir til óljóð.

Ein myndugleiki kann tó gera vegleiðingar um, hvussu metingarheimildir í lóggávu, sum myndugleikin situr fyri, skulu tulkast og útinnast. Í slíkum vegleiðingum ber til at áseta markvirðir. Hóast vegleiðandi markvirðir ikki eru beinleiðis bindandi, kunnu tey, um støði verður tikið í teimum í sambandi við ítøkilig eftirlitsmál, gjøgnum fyrisitingarvenju óbeinleiðis gerast bindandi.

---

10 https://www.us.fo/vernd/#vegleidingar-og-reglugerdir

Við tað at Umhvørvisstovan sum fakkønur umhvørvismyndugleiki longu hevur gjørt eina vegleiðing við vegleiðandi markvirðum, er tó neyvan viðkomandi hjá kommunum at áseta onnur markvirðir í vegleiðing. Umhvørvismálaráðið fer at heita á Umhvørvisstovuna um tryggja sær, at kommunurnar hava kunnleika til vegleiðingina frá 2011.

***3. Hvussu eftirlitið hjá Umhvørvisstovuni sambært § 31 í kunngerðini verður útint í praksis? Undir hesum um talan er um aktivt eftirlit og um eftirlitið sambært § 31 fevnir um eftirlitsuppgávur hjá kommununi í sambandi við vansar av óljóði?***
§ 31 í kunngerðini um umhvørvisreglur er soljóðandi:

> **§ 31. Eftirlit hjá kommunufelagsskapi ella Umhvørvisstovuni.** Kommunustýrum er, eftir at hava boðað landsstýrismanninum frá hesum, heimilað at leggja eftirlitsuppgávur sínar eftir hesi kunngerð til kommunufelagsskap ella Umhvørvisstovuna.
> *Stk. 2.* Umhvørvisstovan hevur eftirlit við fyritøkum, virkjum og útbúnaði, sum kommunustýri eigur í ella rekur.
> *Stk. 3.* Um kommunustýri ella kommunufelagsskapur ikki røkir tær eftirlitsuppgávur, sum eru álagdar kommunustýrinum eftir hesi kunngerð, kann Umhvørvisstovan geva kommunustýrinum boð um, hvussu viðurskiftini skulu fáast í rættlag, ella landsstýrismaðurin kann geva boð um, at eftirlitið heilt ella partvíst skal verða framt av Umhvørvisstovuni.
> *Stk. 4.* Um illgruni er um álvarsligt brot á hesa kunngerð, kann Umhvørvisstovan fremja beinleiðis eftirlit uttan um eftirlitsmyndugleikan á staðnum.
> *Stk. 5.* Eftirlit hjá Umhvørvisstovuni eftir stk. 1 og 3 verður útint fyri rokning kommunustýrisins.

Sambært § 31, stk. 2, hevur Umhvørvisstovan eftirlit við fyritøkum, virkjum og útbúnaði, sum kommunustýrið eigur í ella rekur. Henda ásetingin skal leggja upp fyri spesiellum ógegni sambært vanligum fyrisitingarrættarligum reglum. Til at forða fyri, at eitt kommunustýri hevur eftirlit við egnum fyritøkum, virkjum og útbúnaði, verður uppgávan at hava eftirlit við fyritøkum, virkjum og útbúnaði, sum eitt kommunustýri eigur í ella rekur, løgd til Umhvørvisstovuna. Talan kann t.d. vera um eftirlit við spillvatnsviðurskiftum hjá kommunalum stovnum.

Sambært § 31, stk. 3, kann Umhvørvisstovan geva einum kommunustýri ella kommunufelagsskapi, sum ikki røkir sínar eftirlitsuppgávur sambært kunngerðini, boð um, hvussu viðurskiftini skulu fáast í rættlag.

Umhvørvisstovan sigur seg bæði hava *aktivt* og *reaktivt* eftirlit við kommunustýrum. Tá ið talan er um ampa av óljóði ella royki, sigur Umhvørvisstovan seg hava reaktivt eftirlit við kommununum, oftast í sambandi við klagur ella kærur. Umhvørvisstovan sigur seg oftast vegleiða kommunur um teirra skyldur sambært lóggávuni, men vísir í tí sambandi á, at hon sambært § 38, stk. 1, í kunngerðini um umhvørvisreglur eisini er kærumyndugleiki fyri avgerðir hjá kommunum og tí ikki kann fara inn í ítøkilig mál."

Umboðsmaðurin metti eftir hetta, at málið nú var nøktandi upplýst og farið varð undir endaligu viðgerðina av málinum.

## 4. Niðurstøða

Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um handfaringina hjá Klaksvíkar kommunu av áheitanum klagarans um óljóð, ið stavar frá tí virksemi, ið er á havnarøkinum í Norðhavnini í Klaksvík. Eisini verður leikluturin hjá Klaksvíkar kommunu sum eftirlitsmyndugleiki á umhvørvisverndarøkinum í sambandi við óljóð viðgjørdur.

*Handfaringin av áheitanum klagarans*
Ein myndugleiki eigur at svara einari áheitan frá einum borgara. Hendan skyldan at svara er grundað á góðan fyrisitingarsið og vegleiðingarskylduna í § 7, stk. 1 í fyrisitingarlógini (løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg).

Sambært góðum fyrisitingarsiði og vísandi til vegleiðingarskylduna í § 7, stk. 1 í fyrisitingarlógini, skal myndugleikin innan rímiliga tíð geva einum borgara, ið hevur vent sær til myndugleikan, eitt greitt og fólkaligt svar.

Svarið, sum myndugleikin gevur, kann vera rættiliga ymiskt alt eftir, hvat borgarin hevur vent sær til myndugleikan um. Í summum førum er svarið, at myndugleikin ikki hevur skyldu at svara settum spurningum, í øðrum førum er svarið, at myndugleikin greiðir borgaranum frá, hvørjum málið bíðar eftir, og nær tað væntandi verður avgreitt. Í uppaftur øðrum førum avgreiðir myndugleikin málið, samstundis sum hann svarar borgaranum. Um myndugleikin metir, at fyrispurningurin ikki snýr seg um reglur ella viðurskifti innan egið málsøki, eigur myndugleikin at vísa borgaranum til rætta myndugleika.

Um so er, at myndugleikin metir, at borgarin hevur fingið eitt greitt svar uppá sín fyrispurning, og borgarin heldur áfram at senda myndugleikanum fyrispurningar um sama evni, hevur myndugleikin møguleika at geva borgaranum boð um, at slíkar áheitanir framyvir ikki fara at verða svaraðar. Slík fráboðan skal tó verða grundað á saklig atlit, og samskiftið eigur ikki at verða avmarkað meira enn neyðugt.

Klaksvíkar kommuna hevur upplýst fyri mær, at kommunan strembar altíð eftir at geva eina móttøkuváttan, og at málið verður síðani beint til avvarðandi stjóra. Tá talan er um kærur um óljóð, verður samband í flestum førum tikið við fráboðara gjøgnum telefon. Hesar samrøður eru, sum eg skilji frágreiðingina frá Klaksvíkar kommunu, ikki skrásettar sum telefonnotat. Í hesum sambandi vil eg vísa á, at góður fyrisitingarsiður áleggur einum myndugleika at skriva upp málsviðgerðarstig, sum hava týdning fyri mál, sjálvt um talan ikki er um eitt avgerðarmál eftir fyrisitingarlógini. Atlit skal í hesum høpi m.a. takast at, um talan er um eitt mál, ið má metast at hava stóran týdning fyri borgaran, umframt at ein myndugleiki skal fremja eitt álitissamband millum borgara og myndugleika, m.a. við at notera og journalisera munnligar upplýsingar. Í hesum máli er ikki gjørligt hjá mær at fáa vissu fyri, hvørji svar eru givin klagaranum.

Soleiðis sum málið er lýst fyri mær, fái eg tí ikki mett um, hvørt Klaksvíkar kommuna hevur givið klagaranum eina nóg greiða afturboðan í sambandi við mongu áheitanirnar um óljóð frá virkseminum á havnarøkinum í Norðhavnini.

Eg haldi, at handfaringin hjá Klaksvíkar kommunu av áheitanum klagarans samanumtikið ikki hevur verið nøktandi og ikki í samsvari við góðan fyrisitingarsið ella vegleiðingarskylduna í § 7, stk. 1 í fyrisitingarlógini. Hesa fatan grundi eg á, at Klaksvíkar kommuna ikki hevur skjalprógvað fyri mær, at klagarin hevur fingið greiða afturboðan um, hvat kommunan fór at gera í sambandi við tær ymisku fráboðanirnar og klagurnar. Eg gevi í hesum høpi serliga gætur, at Klaksvíkar kommuna í november 2021 setti í gildi felagskommunala reglugerð um óljóð frá skipum, og at kommunan grundað á hettar hevði neyðuga kunnleikan til evnið umframt førleika at geva klagaranum eitt greitt svar.

Harafturat haldi eg, vísandi til omanfyrinevndu frágreiðingar frá Klaksvíkar kommunu, dagfestar 29. juni og 31. august 2023, at tað hevur týdning, at kommunan hevur eina greiða mannagongd fyri hvør, ið hevur ábyrgdina av at svara einari áheitan, ið verður send kommununi, soleiðis at áheitanir ikki detta niðurímillum. T.d. at ein ávísur málsviðgeri hevur

høvuðsábyrgdina av, at borgarin fær eitt svar, uttan mun til um viðgerðin av áheitanini verður framd av øðrum ábyrgdarpersóni ella persónum innan fyrisitingina.

Klaksvíkar kommuna sigur í frágreiðing til mín, dagfest 31. august 2023, m.a. at "*...Boð frá borgarum til býráðslimir ígjøgnum Messenger (sosialur miðil, mín viðm.), verða ikki skrásettir í journalskipan okkara...*"

Eg skal í hesum sambandi viðmerkja, at býráðslimir aloftast bæði hava eina støðu sum politikkari og eina støðu sum umsitari/avgerðarmyndugleiki í einari kommunalari nevnd. Sum myndugleiki hava býráðslimirnir tá, eins og starvsfólk hjá kommununi, skyldu at tryggja sær, at skjøl, sum hoyra til eitt fyrisitingarligt mál, verða skrásett og gerast tøk hjá viðkomandi starvsfólki, sum skal viðgera málið.

Klaksvíkar kommuna sigur eisini í somu frágreiðing til mín, at "*Eg sjálvur (Vinnu- og mentanarstjórin í Klaksvíkar kommunu, mín viðm,) ella undanmaður mín hava onkuntíð svarað via telefon, men hetta er ikki noterað sum telefonnotat. Men hettar verður tikið til eftirtektar og at hettar verður gjørt frameftir...*"

Eg taki til eftirtektar hesa fráboðan frá Klaksvíkar kommunu og fari samstundis at vísa á týdningin av, at ein myndugleiki hevur eina vælrikna journalskipan. Ein vælrikin journalskipan er fortreytin fyri eini góðari fyrisiting, styrkir um rættartrygdina hjá borgarunum og forðar fyri, at ein myndugleiki nýtir eyka arbeiðsorku til eitt nú at at leita eftir málum og skjølum.

*Kommunan sum eftirlitsmyndugleiki á umhvørvisverndarøkinum*
Í sambandi við klagumálsviðgerðina gjørdist eg kunnug við, at klagarin, umframt at klaga um óljóð frá skipum, eisini klagaði um óljóð frá frystibingjum, ið stóðu á havnarøkinum í Norðhavnini skamt frá einum bústaðarøki.

Óljóð frá skipum er skipað í einari felagskommunalari reglugerð, har tann nýggjasta eitur "Felagskommunal havnarreglugerð" frá januar 2023, meðan tann, ið er sett í gildi fyri Klaksvíkar kommunu eitur "Felagskommunal reglugerð um óljóð frá skipum" frá november 2021.

Hóast ávísur munur er á innihaldinum av báðum útgávunum av reglugerðini, so skipa báðar reglugerðirnar í høvuðsheitum fyri nøkrum markvirðum í dB(A) fyri motorljóðinum frá skipi í ávíst tíðarskeið og heimild hjá kommunala myndugleikanum at seta tiltøk í verk til frama fyri, at ásetta markvirðið verður hildið.

Óljóð frá frystibingjum er hinvegin ikki skipað í felagskommunalu reglugerðini.

Klaksvíkar kommuna hevur boðað mær frá, at kommunan ikki hevur nakra almenna reglugerð viðvíkjandi virkseminum á havnarøkinum í Norðhavnini undir hesum reglum fyri óljóði.

Klaksvíkar kommuna hevur sent mær avrit av leigusáttmálunum við viðkomandi fyritøku, ið virkar á havnarøkinum í Norðhavnini og varðar av umrøddu frystibingjunum. Leigusáttmálin skipar m.a. ávís viðurskifti viðvíkjandi umhvørvisvernd, men hevur onga áseting um óljóð.

Sum bæði Umhvørvisstovan og Umhvørvismálaráðið vísa á í frágreiðingum sínum til mín, dagfestar ávikavist 7. november 2023 og 9. desember 2023, so hevur landsstýrismaðurin við

heimild í § 35, stk. 2, í umhvørvisverndarlógini (løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd) býtt eftirlits- og umsitingaruppgávur sambært lógini millum kommunurnar og Umhvørvisstovuna. Kommunurnar varða serliga av viðurskiftum, sum viðvíkja borgarum, men eisini vinnuligum virksemi, sum ikki er flokkað sum *serliga dálkandi* sambært fylgiskjalinum til umhvørvisverndarlógina, sbr. § 26, stk. 1.

§ 35, stk. 2 er soljóðandi:

> “**§ 35.** ...
> *2. stk.* Landsstýrismanninum verður heimilað við kunngerð at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur tess eftir hesi lóg út til kommunu ella kommunufelagsskapir. Um hvørki kommunan einsæris ella kommunalur felagsskapur eru førir fyri at átaka sær at umsita lógina á staðnum, kann landsstýrismaðurin leggja eftirlits- og umsitingaruppgávurnar til ávísan landsstovn ella landsstovnar.”

Í svari frá Umhvørvisstovuni, dagfest 14. november 2023, vísur Umhvørvisstovan á, at kommunali myndugleikin hevur eftirlit við virkjum, ið ikki eru serliga dálkandi og ið ikki krevja umhvørvisgóðkenning, t.d. farma- og frystigoymslur.

Sambært hesum er Klaksvíkar kommuna eftirlitsmyndugleiki á umhvørvisverndarøkinum viðvíkjandi frystigoymsluni og frystibingjunum á havnarøkinum í Norðhavnini.

Klaksvíkar kommuna hevur við § 8, stk. 1 í kunngerð um umhvørvisreglur (kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur) heimild at geva vinnuligum virksemi, sum elvir til dálking ella heilsuvanda, men sum ikki er nevnt í fylgiskjalinum til umhvørvisverndarlógina og tí ikki er flokkað sum serliga dálkandi, boð um at seta neyðug tiltøk í verk.

§ 8, stk. 1 er soljóðandi:

> “**§ 8.** Elvir vinnuligt virksemi, herundir vinnuligt, alment virksemi og alment og privat byggivirksemi, sum ikki er umfatað av kap. 5 í løgtingslóg um umhvørvisvernd, til dálking ella til heilsuvanda, kann bý- ella bygda(r)ráðið geva boð um, at neyðug tiltøk skulu setast í verk til at fyribyrgja hesum, herundir at avmarkingar skulu vera í tíðarskeiðnum, sum virksemið kann fara fram í.”

Umhvørvismálaráðið vísur á, at kommunur hava stórt rásarúm at útinna sítt eftirlit sambært umhvørvisverndarlógini í sambandi við vinnuligt virksemi, ið hevur óljóð við sær. Sambært ráðnum skal talan tó vera um, at virksemi er av varandi ella áhaldandi slagi og knýtt at ávísari fastogn. Eisini vísur ráðið á, at støði skal takast í vanligum viðkvæmi hjá fólki, umframt at talan skal vera um viðurskifti av ávísum týdningi.

Onki er ásett í umhvørvisverndarlógini, hvussu eftirlitið hjá kommunala myndugleikanum verður útint, men ráðið vísur á, at sambært Umhvørvisstovuni er talan í størstan mun um eitt sonevnt reaktivt eftirlit, ið verður framt t.d. í sambandi við klagur frá borgarum.

Sambært § 9 í umhvørvisverndarlógini hevur landsstýrismaðurin heimild at gera ásetingar um markvirði fyri óljóði:

> “**§ 9.** [1)] Landsstýrismaðurin kann gera ásetingar um krøv um dygd á yvirflatuvatni, luft, jørð, strondum og vøtnum eins og um markvirði fyri óljóði, ristingum og geislingum.”

Umhvørvismálaráðið vísur tó í frágreiðing síni á, at bindandi markvirðir fyri óljóð frá vinnuligum virksemi, sum ikki er flokkað sum serliga dálkandi sambært fylgiskjalinum til umhvørvisverndarlógina, ongantíð eru ásett sambært § 9 í umhvørvisverndarlógini.

Umhvørvismálaráðið vísur eisini á, at kommunali myndugleikin onga heimild hevur sambært umhvørvisverndarlógini at áseta bindandi markvirðir fyri virksemi, ið elvir til óljóð, men at ein myndugleiki kann gera vegleiðingar um t.d. markvirði av óljóði, ið, hóast ikki bindandi, kann verða nýtt sum tulkingaríkast, tá mett verður, um viðurskiftini, ið talan er um, eru av ávísum týdningi sbrt. § 8, stk. 1 í kunngerð um umhvørvisreglur.

Í frágreiðingini frá Umhvørvismálaráðnum verður eisini greitt frá, at Umhvørvisstovan hevur gjørt eina vegleiðing í 2011 nevnd "Vegleiðing um óljóð", ið m.a. inniheldur vegleiðandi markvirði um óljóð frá virksemi, ið ikki er flokkað sum serliga dálkandi virksemi sambært kap. 5 í umhvørvisverndarlógini.

Umhvørvismálaráðið upplýsir fyri mær, at ráðið fer at heita á Umhvørvisstovuna um at tryggja sær, at kommunurnar hava kunnleika til hesa vegleiðing. Hetta taki eg til eftirtektar.

*Samanumtikið*
Eg fari samanumtikið at geva Klaksvíkar kommunu eina átalu fyri handfaringina av áheitanum klagarans. Hesa fatan grundi eg á, at Klaksvíkar kommuna ikki hevur kunnað skjalprógvað fyri mær, at klagarin hevur fingið greiða afturboðan um, hvat kommunan fór at gera í sambandi við tær ymisku fráboðanirnar og klagurnar um óljóð.

Eg fari at minna Klaksvíkar kommunu á skylduna at svara áheitanum frá borgarum og at svarini verða journaliserað.

Harumframt fari eg at heita á Klaksvíkar kommunu um, at tryggja sær, at mannagongdin fyri journalisering tekur hædd fyri støðuni, har býráðslimir móttaka skjøl og fáa áheitanir umvegis privatar samskiftismiðlar, t.d. teldupostar og sosialar miðlar, soleiðis at viðurskifti, ið krevja eina fyrisitingarliga viðgerð hjá kommununi, ikki detta niðurímillum.

Vísandi til frágreiðingina frá Umhvørvismálaráðnum og omanfyrinevndu vegleiðing frá Umhvørvisstovuni um óljóð, fari eg at mæla Klaksvíkar kommunu til at gera mannagongdir og reglugerð um óljóð í sambandi við leiklutin sum eftirlitsmyndugleiki á umhvørvisverndarøkinum fyri virksemi, ið ikki er flokkað sum serliga dálkandi sbrt. kap. 5 í umhvørvisverndarlógini.



Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður